# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Vit fara at fylgja Giuliani um alt landið, tí øll skulu fáa at vita, hvussu hann er*

*(Jim Riches, sløkkiliðsmaður).*

# Vilja ikki hava hann til forseta

**Sløkkiliðsmenninir í New York vilja ikki hava fyrrverandi borgarstjóran í býnum, Rudy Giuliani, til amerikanskan forseta**

Giuliani tykist í løtuni vera tann av republikanarunum, sum hevur bestu møguleikarnar at gerast valevni til forsetavalið næsta ár, men hesum ætla sløkkiliðsmenninir í New York at forða fyri.

Í døgunum eftir atsóknina tann 11. september í 2001 bleiv Giuliani, sum tá var borgarstjóri í New York, ofta avmyndaður saman við illa sperdum sløkkiliðsmonnum, sum stríddust við at sløkkja eldin í Ground Zero. Hann nýtti ofta somu jakkar og húgvur sum sløkkiliðsmenninir, og hetta gjørdi hann sera væl umtóktan millum fólk.

Men sløkkiliðsmenninir í New York halda lítið av honum. Teir halda, at fyrrverandi borgarstjórin vísir lítla virðing fyri teimum 343 sløkkiliðsmonnunum, sum doyðu tann 11. september í 2001, og nú hava teir sett sær fyri at forða fyri, at Rudy Giuliani verður amerikanskur forseti.



*Rudy Giuliani (við húgvu hjá sløkkiliðnum í New York) saman við George W. Bush, forseta og leiðaranum hjá sløkkiliðsmonnunum í New York, Thomas van Essen. Myndin er tikin nakrar dagar eftirt atsóknina 11. september í 2001.*

# Fyrsta kvinnan

**Fyri fyrstu ferð hevur svenski javnaðarflokkurin fingið eina kvinnu í formanssætið**



- Eg eri ómetaliga fegin og ómetaliga stolt av at vera tann fyrsta kvinnan, sum stendur á odda fyri 118 ára gamla flokki okkara, segði Mona Sahlin, tá eykalandsfundurin hjá svenska javnaðarflokkinum valdi hann til formann um vikuskiftið.

Mona Sahlin var einasta valevni til formansstarvið. Hon er tann sjeyndi formaðurin í svenska javnaðarflokkinum, og felags fyri allar undanmenn hennara er, at allir hava verið svenskir forsætisráðharrar. Um Mona Sahlin eisini megnar at røkka tí málinum, vita vit ikki enn. Tann fyrsta royndin verður um hálvt fjórða ár.

Ein spurnarkanning hjá svenska sjónvarpinum vísir, at sviar eru ójavnir á máli um Monu Sahlin. Summi halda, at hon er ein dugnaligur politikari, men onnur halda, at tað er einki nýskapandi við at velja hana til formann.

# Noreg kann krevja oyggjar í Kanada

**Kanadiski granskarin Derek Heyes vil vera við, at Noreg kann krevja rættindini til tríggjar oyggjar í útnyrðingspartinum av Kanada.**

Upprunin til ta heldur sjáldsomu søguna er, at tað var norski rannsóknarmaðurin Otto Sverdrup, sum fann tær tríggjar oyggjarnar, tá hann var á kanningarferð har um leiðir í árunum frá 1898 til 1902. Tað sermerkta við oyggjunum er eisini, at tær hava norsk nøvn og eru uppkallaðar eftir monnunum aftan fyri tað kenda Ringnes-bryggjaríið í Oslo, sum fíggjaði kanningarferðina hjá Sverdrup.

Otto Sverdrup kravdi oyggjarnar lagdar undir norsku trúnuna, men Noreg slepti kravinum í 1930, tá kanadiska tjóðartingið rindaði Sverdrup 67.000 dollarar fyri dagbøkur hansara og kortið av umráðnum, sum hann hevði kannað. Men nú vísir tað seg, at kortið er ikki at finna ú nøkrum kanadiskum savni, og Derek Heyes vil vera við, at er kortið í Noregi, kunnu norðmenn framvegis krevja tær tríggjar oyggjarnar.

Men Noreg fer ikki at krevja oyggjarnar, sigur Karsten Kleppsvik í norska uttanríkisráðnum við Aftenposten.

- Satt at siga haldi eg, at vit eru nøgd við tað, sum vit hava, sigur hann.



*Tað eru tær tríggjar oyggjarnar longst til vinstru, men Otto Sverdrup fann.*

## STUTT SAGT

### Aftur harðskapur

Nógv bendir á, at uppaftur eitt leiðandi umboð fyri andstøðuna í Zimbabwe hevur fingið ringa viðferð frá myndugleikunum. Í gjár frættist, at talsmaðurin hjá Rørsluni fyri Demokratiskari Broyting, Nelson Chamisa, var vorðin tikin, tá hann skuldi við flogfari til Bruxelles. Aðalskrivarin í rørsluni sigur við tíðindastovurnar, at løgreglan tók Nelson Chamisa, og at hann bleiv bukaður. Millum annað skulu løgreglumenninir hava sligið hann í høvdið við jarnstongum. Í síðstu viku mátti leiðarin í størsta andstøðuflokkinum í Zimbabwe, Morgan Tsvangirai, á sjúkrahús við løstum, sum hann hevði fingið, meðan hann sat í varðhaldi hjá løgregluni.

### Mátti neyðlenda

Eitt flogfar við avstralska forsætisráðharranum, John Howard, umborð noyddist leygardagin at neyðlenda á einum flogvølli í Irak. John Howard hevði verið og vitjað teir avstralsku hermenninar, sum hava støð har suðuri í Irak. Haðani skuldi hann til Bagdad, men tá flogfarið var á veg hagar, varnaðist flogskiparin brádliga royk í lastini á flogfarinum. Hann gjørdi tí av at neyðlenda á einum flogvølli har suðuri í Irak. Sambært avstralska sjónvarpinum ABC fekk eingin skaða av tilburðinum, og John Howard helt seinni leiðina fram til Bagdad við einum øðrum flogfari.

### Dálkað luft

Tað hevur ikki regnað har norðuri í Teilandi síðani í november, og í landspartinum Chiang Mai er jørðin so turr, at eitt skýggj av dusti hongur í luftini. Um vikuskiftið sendu myndugleikarnir eitt flogfar at spræna eina blanding av kunsttøðum og salti í dustskýggið. Ætlanin var, at blandingin skuldi elva til regn, og royndin eydnaðist so mikið væl, at myndugleikarnir hava gjørt av at endurtaka hana. Tað er í tøkum tíma, tí heilsumyndugleikarnir hava leingi ávarað um, at luftin í pørtum av Teilandi er so illa dálkað, at hon er heilsuskaðilig fyri fólk. Skógareldar hava herjað Teiland í seinastuni, og tað hevur ikki bøtt um støðuna.